# ítróttur

Nr. 28 • mikudagur • 8. februar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Birgir setir kós ímóti FSF-toppinum

**Fram fer vegna 15 feløg at skjóta fyrrverandi HB-formannin, Birgir Enghamar, upp til formansvalið í Fótbóltssambandinum. Uppskotsstillararnir kenna seg vísar í, at Birgir Enghamar verður valdur á aðalfundinum síðst í februar**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Fram skjýtur vegna 15 feløg upp, at Birgir Enghamar verður nýggjur formaður í Fótbóltssambandinum. Standa tey 15 feløgini við uppskotið á aðalfundinum, verður fyrrverandi HB-formaðurin nýggjur fótbóltsbossur í Føroyum*

Nú skuldi tað verða púra vist, at Birgir Enghamar stillar upp til formansvalið í Fótbóltssambandinum.

Fram skuldi mikudagin lata inn uppskotið um Birgir Enghamar sum formansvalevnið til FSF-aðalfundin, og skuldi høvuðsstaðarfelagið gera vegna 15 feløg.

Formaður í Fram er Magnus Fuglø, og hann váttar, at hansara felag fer at lata FSF uppskotið, og tað skuldi gerast mikudagin.

– Ja, vit fara at skjóta Birgir Enghamar upp til formansvalið, og tað gera vit vegna fleiri feløg, segði Magnus Fuglø beint fyri middag mikudagin.

Formaðurin í Fram vil ikki siga, hvussu nógv feløg talan er um, og hvørji tey eru, men Sosialurin hevur skilt, at talan er um 15 feløg. Tey, sum ikki hava skrivað undir skrivið til FSF, eru TB, VB, Sumba, Royn, B71, KÍ og B68.

Tað verður framvegis arbeitt dúgliga handan leiktjøldini, og tí kundi okkurt einstakt felag koma upp í afturat, hevur Sosialurin skilt.

### Hava vunnið sær undirtøku

Tað var í síðstu viku, at tíðindini komu fram um, at arbeitt verður handan leiktjøldini við at fáa undirtøku fyri Birgir Enghamar sum nýggjan formann í FSF. Tá vildi eingin váttað nakað, men nú er hetta arbeiði komið so langt, at uppskotið kann latast FSF.

Aðalfundurin hjá Fótbóltssambandinum verður leygardagin 25. februar, og freistin at lata uppskot inn til nýggjan formann í FSF er úti hóskvøldið. Óli Holm stendur fyri valið, og hann ætlar sær at stilla uppaftur.

– Verður tað ein atkvøðugreiðsla um formanssessin, so er eingin ivi um, at undirtøka er fyri Birgir Enghamar, sigur Magnus Fuglø, formaður í Fram.

### Meirilutin kann broytast

22 feløg og nevndin í FSF atkvøða í formansvalinum, og um Birgir Enghamar hevur undirtøku frá 15 feløgum, er talan um ein greiðan meiriluta.

Tað er tó ógreitt, um feløgini hava bundið seg til at atkvøða fyri fyrrverandi HB-formanninum, ella um tey bara eru við til at seta uppskotið fram. Áður hevur tað víst seg, at feløg broyta hugsan frá tí, at uppskot verða sett fram til atkvøtt verður.

Í øllum førum er stór undirtøka fyri at skjóta Birgir Enghamar upp sum nýggjan formann í Fótbóltssambandinum.

---

# Turkaland fekk harða revsing

**Ruðuleikin eftir HM-dystin ímóti Sveis í fjør hevur nú kostað Turkalandi eina harða revsing. Landið skal spæla sínar næstu seks landsdystir á uttanveltaðum vølli uttan áskoðarar**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað endaði við sonnum ruðuleika, tá ið Turkaland og Sveis í fjør spældu play-off dyst um seinastu plássini í HM-endaspælinum í Týsklandi. Sveis megnaði at vinna dystin, og seinsta dómarabríksla var alt á gosi á turkiska leikvøllinum.

Sveisisku spælararnir vóru álopnir av bæði turkiskum spælarum, leiðarum og løgreglufólki, og teir kendu seg veruliga hóttar. Onkrir spælararnir fingu smærri løstir av tilburðinum.

Nú hevur FIFA givið turkiska fótbóltssambandinum eitt dygt slag á vangan fyri hendingina.

Turkaland skal spæla sínar næstu seks landsdystir á einum uttanveltaðum leikvølli uttan áskoðarar. Harafturat hava fleiri spælarar og leiðarar eisini fingið revsingar.

### Emre og aðrir leikbannaðir

Turkiski ítróttarráðharrin er sera misnøgdur við revsingina.

– Avgerðin er meira politisk enn ítróttarlig, heldur Sahin, sum ætlar sær at stríðast fyri at broyta avgerðina hjá FIFA.

– Vit fara at gera alt, vit kunnu fyri at broya avgerðina, og vit vóna, at FIFA fer at rætta sítt mistak, sigur ráðharrin.

Miðvallarspælarin Emre og verjuspælarin Alpay hava fingið seks dagar leikbann hvør. Hesa somu revsing hevur eisini sveisiski spælarin Benjamin Huggel fingið. Turkiski hjálparvenjarin Ozdilek er bannaður frá øllum fótbólti í eitt ár, og turkiski spælarin Serkan Balci og sveisiski fysioterapeuturin Meyer hava fingið leikbann í tveir dagar. Harafturat hava hesir persónar eisini fingið bøtur.

---

## Jón Rói bíðar eftir svari

Fótbóltsspælarin Jón Rói Jacobsen skal fríggjadagin skannast í knænum, har hann fekk skaða um vikuskiftið.

Tað var á venjingarlegu hjá AaB í Turkalandi, at føroyski landsliðsspælarin fekk ein løst í knæið. Talan kann verða um ein álvarsaman skaða, men endaliga kanningin verður ikki gjørd fyrr enn fríggjadagin, og til ta tíð mugu Jón Rói og øll hini bíða eftir endaligum boðum.

Jón Rói hevur áður slitið krossband í knænum, og nú krossa hann og onnur fingrar fyri, at talan ikki verður um slíkan álvarsaman skaða aftur hesaferð.

## Vilja hava Hamrén

Svenska Aftonbladet vil vera við, at felagið Hammarby liggur fram við eftir Erik Hamrén sum nýggjan venjara í felagnum. Hamrén er í løtuni venjari hjá Jón Róa Jacobsen og Suna Olsen í AaB, og har hevur hann klárað seg væl.

– Eg havi fingið nógvar fyrispurningar frá svenskum feløgum, men eg ikki viðmerkja nakað um, hvørji feløgini eru. Tað er nógvur slatur, sigur Erik Hamrén.

Sáttmálin hjá Hamrén í AaB gongur út á nýggjárinum.

## Ingi var ikki við

Í seinastu løtu varð Ingi Højsted valdur frá til hópin hjá Birmingham, sum spældi steypdyst ímóti Reading týskvøldið. Ingi hevði annars fingið boð um, at hann skuldi halda seg kláran til dystin, tí so nógvir av vanligu spælarunum á 1. liði ikki kundu verða við vegna skaðar og leikbann.

Birmingham vann dystin í FA Cup 2-1, men Ingi Højsted var hvørki á vøllinum ella á beinkinum til dystin.

Tað hevur gingið væl hjá Inga seinastu vikurnar. Hann er sloppin av við ein skaða, sum argaði hann, og hann hevur spælt á eykaliðnum hjá felagnum. Í næstu viku skal hetta lið spæla ímóti eykaliðnum hjá Manchester United.